# skal til Afghanistan



Endamálið hjá NATO-herliðinum í Afghanistan er at tryggja friðin í landinum og at endurbyggja landið. Soleingi sum mótstøðan móti hesum er til staðar, er neyðugt at teir donsku hermenninir eru í góðari venjing



- Eg eri til reiðar at gera mítt til at uppgávan í Afghanistan verður loyst, sigur 27 ára gamli Valdimar Tjørnudal úr Afghanistan



Valdimar er við í eini skotroynd, men her verður bert skotið við leysakrúti. Men tá teir koma til Afghanistan kann tað verða ein spurningur um lív ella deyð. Tá verður annað krút brúkt

- Hetta er ikki heilt vandaleyst arbeiði, tí tú stendur yvirfyri einum fígginda sum ynskir teg av hundanum til. Men vit eru komnir higar við friði, og skulu tí bert skjóta aftur, um tað altso verður skotið eftir okkum.

- Og sum eg skilji, eru fólk sera positiv fyri okkara arbeiði. Tey bæði merkja og síggja, at vit gera mun, slær hann fast.

## Við vápni í hond

Vandin við at vera hermaður er til eina og hvørja tíð, at ein kann missa lívið í hesi tænastuni.

Hetta er Valdimar eisini fult greiður um, og júst hetta at forða fyri hesum verður ein av hansara uppgávum í Helmand-landslutinum. Her verða teir skipaðir í bólkar við seks hermonnum í hvørjum.

Ein uppgávan verður at vitja í teimum ymisku bygdunum og vita, um bygdarfólkið veit um nakar talibani er til staðar her. Í hesum sambandi hava teir eisini møguleika at hjálpa fólkinum á ymiskan hátt.

Teir læra eisini, hvussu ein ber seg at, um ein skuldi verið so óheppin at verða tikin fangi og hvussu ein kann senda út loynilig boð uttan at fíggindin fær tað at vita.

- Við royndum mínum sum skjútti, komi eg at ganga aftast ella uttast fyri at verja hinar ímóti snigskjúttum. Her er neyðugt at halda eygu og oyru opin, tí teir kunnu koma allastaðni frá, greiðir Valdimar frá.

*Fólkið snøgt sagt er vorðið troytt av talibanunum og atsóknum teirra. Tey ynskja frið, og tí eru tær friðarvarðveitandi herdeildirnar vælkomnar*

## Hevur skrivað testamenti

Hóast Valdimar Tjørnudal bert er 27 ára gamal hevur hann longu skrivað eitt testamenti. Hetta skulu allir teir gera, sum fara avstað soleiðis sum hermenn. Her skal hann millum annað skriva, hvussu hann vil at ein møgulig jarðarferð skal skipast ella um hann ynskir at lík hansara skal brennast. - Eg skuldi eisini skriva, hvar eg møguliga skuldi jarðast. Hetta skuldi sjálvandi vera heima í Føroyum. - Men hetta var sera undarligt at skriva, tað má eg siga. Eg meini, - eg eri so ungur og skal longu skriva eitt testamenti og kanska eisini eitt afskedsbræv til míni kæru, sigur Valdimar. Sjálvur gongur hann saman við eini føroyskari gentu, sum í løtuni er undir útbúgving í Danmark. Henni dámar einki at hann fer allan vegin til Afghanistan í kríggj. - Hon er ein antikríggj-dama, so tað er skilligt at hon ikki er glað um at eg fari avstað!